# Japanarar á odda í týskari kanning




Besti umtókti mikrobilur varð Toyota Aygo

Í eini kanning sum kendi amerikanski analysustovnurin J.D. Power hevur gjørt fyri týska bilblaðið Auto Bild, ið umfatar kvalitet, image, service og hvussu týsku bilaeigararnir eru nøgdir við sínar bilar, liggja japansk bilmerkir klárt á odda.

Í kanningini luttóku 19.916 týskir bilaeigararnir, og bilarnir høvdu koyrt 30.000 km í miðal.

Bilarnir vóru deildir upp í sjey ymiskar kategoriir.

Besti umtókti mikrobilur varð Toyota Aygo, meðan best umtókti minibilurin var Honda Jass, í minna miðalklassanum var Honda Civic best umtóktur, og í størra miðalklassanum var tað Toyota Prius, BMW 500 var best umtókti stjórabilur, Toyota Corolla Verso var best umtókti MPV, og best umtókti 4x4 var BMW X3.

Allir bilarnir vóru frá 2005 og 2006. Í fimm av sjey kategorium lógu japansk bilmerkir á odda.

*Kelda: Auto Bild*




*Best umtókti 4x4 var BMW X3*



*Í minna miðalklassanum var Honda Civic best umtóktur*



*Tesla Roadster varð presenteraður á Bornholm*

# Heimsins kvikasti elbilur

Heimsins kvikasti elbilur varð presenteraður á Bornholm tann 3. september 2008.

Tað vóru amerikanska verksmiðjan Tesla Motors og danska el-fyritøkan Østkraft Energi Service A/S, sum kundu sýna fram heimsins kvikast el-bil, Tesla Roadster, á Bornholm.

Tesla Motors hava ætlanir um at gera sportbilar, sum kunnu kappast við bilmerkir sum Porsche, Ferrari og Lamborghini, men við tí muni at Tesla sportbilarnir verða el-drivnir, sigur Casper Kjøller frá Østkraft Energi Service A/S, sum leggur afturat at Tesla Motors eisini hava ætlanir um at framleiða el-drivnar familjubilar.

Tesla Motors er ein fyritøka, sum varð stovnað í 2003 í Silicon Valley í USA.



# Corsa og Astra EcoFlex



Fyrst í 2009 koma Opel á marknaðin við tveimum sera orkusparandi ecoFLEX dieselútgávum av Corsa og Astra.

Corsa 1,3 CDTI ecoFLEX koyrir 24,4 km/l, við CO2 útláti upp á 109 gram pr. kilometur, meðan Astra 1,7 CDTI ecoFLEX koyrir 22,2 km/l við CO2 útláti upp á 119 gram pr. kilometur.

Bæði Corsa Og Astra ecoFLEX hava viðlíkahaldsfrítt partikulfilter sum standard.